BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ

# Verkætlanarleiðari og samskipari til Barnaverkætlanina

**Avbjóðandi og spennandi størv sum verkætlanarleiðari og samskipari til Barnaverkætlanina eru leys at søkja**

**Størvini**
Søkt verður eftir dugnaligum verkætlanarleiðara og samskipara, sum skulu taka sær av dagliga rakstrinum av barnaverkætlanini og samskipa ymsu verkætlanarsporini.

Hetta er ein einastandandi møguleiki at verða partur í eini nýskapandi tilgongd, sum hevur sum endamál at loysa avbjóðingar innan barna- og ungdómsøkið gjøgnum tvørgangandi samstarv og felags átøk.

Talan er um tvørgeiraligt samstarv, sum verður skipað og ment gjøgnum Barnaverkætlanina í Barna- og útbúgvingarmálaráðnum. Samstarvið umfatar allar geirar og øki, sum hava við børn og ung at gera. Breið politisk semja er gjørd um at virka í felag fyri at laga niður forðingar, sum kunnu verða millum ymsu skipanirnar og geirarnar, tá tørvur er á at tryggja sameindar og samskipaðar tænastur til børn og ung.

Ein nýskipanartilgongd verður skipað við einum kraftdepli fyri nýmenning, har arbeiðið verður lagt til rættis við nýggjastu vitan um háttaløg, sum eru fremjandi fyri at røkka nýggjum felags loysnum, har allir viðkomandi partar luttaka í tíðarásettum sprintum. Sum liður í tilgongdini verða pilotverkætlanir royndar sum partur av tilgongdini at finna loysnir.

Verkætlanarleiðarin og samskiparin manna ryggin í nýskapanar kraftdeplinum, sum skal skipa og veita tænastur í sambandi við, at skiftandi avbjóðingar verða viðgjørdar og felags loysnir funnar.

**Visiónin**
Visiónin er, at Føroyar skulu verða tað besta staðið í heiminum hjá øllum børnum og ungum at vaksa upp í. Øll børn og ung skulu hava tryggar og góðar karmar, sum tey mennast og mentast í, til tess at tey blíva heil menniskju, sum kunnu virka í einum rúmligum demokratiskum samfelagi, har øll trívast. Fyribyrgjandi átøk eru partar av hesum.

Børn- og ung, sum hava tørv á hjálp og stuðli fyri at hava viðburð, skulu fáa tær neyðugu veitingarnar og tænasturnar so tíðliga og munadygt sum møguligt. Ein skilagóð fyriskipan skal tryggja sameining og samskipan av fjølbroyttum tænastum, sum ymsir geirar og stovnar veita, soleiðis at hesir samvirka til tess at veita eina so góða tænastu sum møguligt.

**Uppgávurnar**
Verkætlanarleiðarin hevur dagligu leiðsluna av Barnaverkætlanini og skipar virksemi við ymsu verkætlanarsporunum.
Samskiparin er verkætlanarleiðaranum til hjálpar og til samans umfata uppgávurnar:

- Verkætlanarráðlegging og uppfylging
- Scrum-master
- Samskifti við áhugapartar
- Samskipan av tilfeinginum í verkætlanini
- Leiðsla av átøkum
- Skjalfesting og frásagnir
- Móttøka av verkætlanarluttakarum

Nærri frágreiðing um Barnaverkætlanina finst á heimasíðuni www.bumr.fo.

Talan er um størv í einum spennandi organisatoriskum og politiskum arbeiðsumhvørvi, og skalt tú vera før/ur fyri at kunna arbeiða undir einum ávísum trýsti.

**Persónarnir**
Talan er um sjálvstøðugt arbeiði, umframt at arbeiða í verkætlanartoymi og skiftandi arbeiðsbólkum. Tú skalt vera tænastusinnað/ur, fyrikomandi og hava góð samstarvsevni. Tú skalt hava førleika skjótt at seta teg inn í nýggj viðurskifti og duga at miðla hetta víðari til onnur. Tú skalt hava góð analytisk evni umframt politiskt

tev og áhuga fyri samfelagsviðurskiftum í síni heild og barna- og ungdómsøkinum serstakliga, eins og førleikar í fremmandamáli, serliga enskum.

**Førleikar**
Umsøkjari skal hava viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni. Fyrimunur er at hava innlit og royndir frá verkætlanarleiðslu ella verkætlanararbeiði.

Vera skipað/ur og duga væl at orða seg á føroyskum og donskum, bæði í skrift og talu. Umframt góðar førleikar í enskum.

**Vit bjóða**
Starvið er spennandi við eini týdningarmiklari avbjóðing og við nógvum samskifti inn- og úteftir. Arbeiðið er á einum høgum fakligum stigi, og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

**Setanar- og lønartreytir**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag. Setanarøkið fevnir um Løgmansskrivstovuna, stjórnarráðini og deildir teirra.

Størvini verða lýst leys til setanar tann 1. apríl 2024. Fyribils tíðaravmarkað til 31. desember 2026.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, CV og øðrum viðkomandi skjølum skal sendast til:

Barna- og útbúgvingarmálaráðið
J. H. Schrøtersgøtu 7
Postrúm 3279
110 Tórshavn

ella við telduposti til: bumr@bumr.fo

Umsóknin skal verða Barna- og útbúgvingarmálaráðnum í hendi í seinasta lagi **mánadagin 11. mars 2024**. Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú seta teg í samband við Poul Geert Hansen, aðalstjóra, á tlf. 555010, ella t-post PoulGeertH@bumr.fo.

***Barna- og útbúgvingarmálaráðið** fyrisitur høvuðsmálsøkini barnavernd, barnaheilsu, dagstovnaøkið, útbúgving og gransking. Sí heimasíðu ráðsins www.bumr.fo*